**Samanumtøka**

# Verkstova um burðardygt matsjálvbjargni í Føroyum

**Tiltak á Búnaðarstovuni leygardagin 15. apríl 2023, kl. 10-15.**
**Fyriskipað av Umhvørvisstovuni og Búnaðarstovuni.**
**Fíggjað av norðurlendska ráðharraráðnum.**

Leygardagin 15. apríl 2023 skipaðu Búnaðarstovan og Umhvørvisstovan fyri verkstovu um burðardygt matsjálvbjargni í Føroyum á Búnaðarstovuni í Kollafirði. Skrá er í fylgiskjalinum. Eini 60 fólk tóku lut á verkstovuni.

Smásamfelagsbólkurin undir norðurlendska ráðharraráðnum tók í 2020 stig til eina verkætlan um sjálvbjargni við mati í norðurlendskum smátjóðum/samfeløgum. Umhvørvisstovan umboðar Føroyar í Smásamfelagsbólkinum, meðan Búnaðarstovan var partur av verkætlanini.

Úrslitið av verkætlanini er frágreiðingin *Selvforsyning af fødevarer i fem nordiske øsamfund. Bornholm, Færøerne, Grønland, Island og Åland*, sum leggur fram møguleikar og avbjóðingar fyri at økja sjálvbjargni við mati á burðardyggum grundarlagi í Føroyum og hinum luttakandi londunum. Trý høvuðstilmæli vórðu orðað fyri hvørt land. Endamálið við verkstovuni var at fara víðari og ítøkiliggera hesi trý tilmæli fyri Føroyar:

1. ***At styrkja samstarv og dialog millum allar partar í virðisketuni - frá matframleiðara til keypara - fyri at bøta um atgongdina til matvørur, ið eru framleiddar í Føroyum.***

2. ***At finna hóskandi støði fyri matvøruframleiðslu og matvørutrygd og seta ítøkilig mál. Lóggáva og peningalig tileggjan og virkisætlanir eiga at stuðla undir málunum (við meginreglum um burðardygd)***

3. ***At kanna møguleikarnar at dyrka meira grønmeti, undir hesum at verja øki, ið eru egnað til at dyrka grønmeti, og at nýta tøð, sum eru framleidd í Føroyum.***

Verkstovan varð skipað í trimum pørtum, ein part fyri hvørt tilmæli. Hvør partur byrjaði við, at eitt tilmæli varð lagt fram. Síðani fekk eitt pallborð, mannað við fólki við royndum og vitan, høvi at siga sína hugsan um, hvat skal gerast fyri at fremja tilmælið í verki. Eftir hetta var bólkaarbeiði. At enda vórðu niðurstøðurnar frá bólkaarbeiðinum lagt fram í plenum.

Hetta skjalið er skrivað fyri at skjalfesta verkstovuna, soleiðis at viðkomandi ráð, stovnar, feløg og annars øll áhugað betri kunnu taka úrslitini frá verkstovuni við, tá arbeitt verður víðari við at fremja burðardygt matsjálvbjargni í Føroyum.

Meginparturin av tekstinum er slíkt, sum varð sagt á verkstovuni. Fyrireikararnir taka neyðturviliga ikki undir við øllum, sum er endurgivið í hesum skjali.

# I. PARTUR

**Í fyrsta parti av verkstovuni varð hugt nærri at hesum tilmælinum:**

**Tilmælið:** ***Kanna møguleikarnar at dyrka meira grønmeti og at verja øki, ið eru egnað til at dyrka grønmeti, og brúka tøð, sum eru framleidd í Føroyum.***

## Samanumtøka frá verkstovuni

***Nýhugsan innan matframleiðslu – hugsa nýtt og hugsa ringrás***

Vit skulu duga betur at dyrka okkara vitan, eisini innan 'ringrásskipanir'. Hvat ber til í Føroyum t.d. innan Aqua- og Hydroponics? Tað er m.a. sjálvsagt at hava vakstrarhús við smoltstøðir, har spillivatn kann brúkast til at taða við.

***Vegleiðingar***

Mælt verður til at fáa atgongd til fleiri vegleiðingar, bæði til vinnuliga og privata framleiðslu. Tað er umráðandi, at øll, bæði vinnan og einstaklingar, hava møguleika at læra, hvussu ein kann gerast meira sjálvbjargin við mati.

***Felagsskapir***

Felagsskapir hava stóran týdning. Felagsskapurin um veltingina á Sandi hevur havt alstóran týdning fyri grønmetisveltingina á Sandi; og áhugi var millum luttakararnar at fáa fleiri felagsskapir, soleiðis at vit, saman, kunnu dyrka meira grønmeti.

Hóast nevnt var, at velting av eplum og rótum lønar seg; so kemst ikki undan, at manglandi arbeiðsorka/handakraft er ein avbjóðing millum framleiðarar, um grønmetisframleiðslan skal økjast; og skulu vit økja um hesa framleiðslu skulu maskinur til.

***Vitanarspjaðing***

Áhugi er fyri at miðla føroyska matframleiðslu enn meira, so hon gerast meira sjónlig millum íbúgvar landsins, bæði í samband við vitanarspjaðing og fyri at skapa vaksandi eftirspurning eftir føroysku vørunum.

Sum heild vantar útbúgving, vitan og føðslutalvur til føroyskt framleiddar vørur.

***Verja matjørð***

Vit hava sum samfelag skyldu at geva komandi ættarliðum møguleikan at gagnnýta jørðina til matframleiðslu.

Sum nú er, er jørðin so sundurstykkjað, at eigarar/festarar køva hvønn annan. Hetta hevur verið tosað um í fleiri ár, men tað er neyðugt áhaldandi at vísa á tørvin at hyggja

nærri eftir hesum. Neyðugt er at økja um atgongdina til góða landbúnaðarjørð. Sum dømi varð víst á, at vit kundu byrjað við, at roynt okkum við at verja landsjørð, sum er egnað til matframleiðslu.

Landið eigur at hava yvirlit yvir, hvørji lendi eru egnað til matvøruframleiðslu.

***Kommunur bjóða fram øki at velta í***

Fleiri bólkar nevndu týdningin av, at kommunur kring landið, av sínum eintingum, kunnu vísa á lendi, sum áhugað kunnu brúka til matframleiðslu. Eitt annað, sum varð nevnt, var at festarar kundu gjørt sítt til, at fólk fáa betri atgongd til lendi, t.d. við at leiga út smá jarðarstykki til grønmetisframleiðslu.

Ein hugburðsbroyting skal til fyri at verja lendið. Planlóggáva er neyðug, men ring at fáa ígjøgnum politiskt.

***Tørvur er á vitan og royndum um nýtslu av tøðum frá Førka***

Tað skal gerast meira atkomiligt at fáa vitan um, hvat riggar, og hvat ikki riggar ísv. grønmetisvelting og taðing. Bøndur skulu t.d. føla seg tryggar í at brúka tøð frá Førka, men hartil krevur meira vitan um, hvat kemst burturúr, og hvat hetta ger við umhvørvið. Ein luttakari gjørdi vart við, at tøðini frá Førka hava eitt stórt potentiali. At hetta er ein landbúnaðarkollvelting fyri Føroyar. Men víst var eisini á, at tørvur er á røttu vitanina, soleiðis at tøðini verða brúkt við skili, og at tøðini frá Førka eiga at verða meira atkomilig hjá teimum, ið fáast við grønmetisframleiðslu. Hetta hevði kunnað lyft landbúnaðin ella úrtøkuna munandi. Afturat hesum var breið semja um, at tað hevði verið ynskiligt við fleiri royndum m.a. við tøðunum. Eitt uppskot var, at Búnaðarstovan skuldi havt møguleikan at samskipa hetta og havt møguleikan at gera fleiri royndir kring alt landið, so ikki er neyðugt, at bøndur, hvør í sínum lagi, skulu royna sjálvir.





# II. PARTUR

**Í øðrum parti av verkstovuni varð hugt nærri at næsta tilmælinum:**

**Tilmæli:** ***Stuðla tættari samstarvi millum partarnar í allari virðisketuni í matvøru-skipanini fyri at bøta um atgongdina til matvørur, sum eru framleiddar í Føroyum.***

## Samanumtøka frá verkstovuni

### *Alt á einum stað?*

Ynskiligt er við eini skipan frá framleiðara til brúkara, har møguligt er at samla føroyskar matvørur á einum stað. Nevnt varð, at hetta kundi verið MBM, sum kundi tikið ímóti og skipað fyri at koyrt víðari út í handlar, kundar o.s.fr. Tað er avbjóðandi hjá framleiðarum at skula pakka, prísmerkja og koyra út vøru kring landið. Um vit skulu hava størri matframleiðslu í Føroyum, má tað vera lættari hjá framleiðara at sleppa av við sína vøru.

Ein avbjóðing við sølu av grønmeti er, at tað skal etast skjótt og tí eisini vera lætt og skjótt hjá framleiðara at sleppa av við. Tí er tað umráðandi við vitanardeiling úti í handlunum ísv. handfaring av t.d. grønmeti.

### *Tollforðingar og útflutningur*

Føroyski marknaðurin er at kalla púra opin fyri innflutningi av matvørum úr t.d. ES, undantikið eitt lítið punktgjald á mjólk og kvotu á seyðakjøt. Ein nevndi, at føroyskir myndugleikar fyri langari tíð síðan hava avreitt allar møguleikar til at gera nakað sum helst mótvegis innfluttu vørunum. Vørur úr t.d. ES og úr Íslandi hava munandi almennan stuðul. Enn hava vit punktgjøld á onkrum vørum. Trupulleikin við t.d. íslandssáttmálanum er, at hann í stóran mun bara gongur annan vegin. Vit mangla skipanir í Føroyum, ið gera tað møguligt at flyta út føroyskar vørur til Íslands. Harumframt kunnu vit heldur ikki leggja toll á tær innfluttu landbúnaðarvørurnar, sum vit kanska kundu framleitt meira av í Føroyum. Inntøkur, sum høvdu kunnað verið brúktar til at hjálpt til fíggjarliga á teimum gørðunum, ið ynskja at framleiða vinnuligt. Loysnin er samstarv millum framleiðarar og myndugleikar um at gera skipanir, sum gera tað eggjandi at framleiða í Føroyum. Har hevði ein mvg-afturberingarskipan verið eitt boð uppá loysn.

### *Órímilig krøv forða vinnuligum landbúnaði*

Á verkstovuni varð víst á, at órímilig krøv um grannskoðan av søluni verða sett, tá tað almenna letur stuðul, og at kostnaðurin fyri grannskoðan kann taka lutfalsliga stóran part av sjálvum stuðlinum. Hetta ger, at ein stórur partur av teimum, ið høvdu viljað

verið við til at framleiða, missa hugin at fara í gongd við vinnuliga framleiðslu. Í staðin hugsar man í minni nøgdum, gloymir myndugleikan og selur svart, varð sagt.

Ivasamt er, um uppáhaldið er rætt. Um so er, er tørvur á upplýsing um galdandi reglur.

***Bøta um atgongd til føroyskan mat***

Tað er umráðandi, at vit tryggja okkum, at øll hava atgongd og ráð at keypa føroyskt. Kunnu vit fáa eina stuðulsskipan, ið tryggjar hetta?

Vaksandi marknaðarmentanin er góð og umráðandi í samband við vitan, kunnleika og samband við keypara. Her verða framleiðarar meira sjónligir, og her er møguleiki at marknaðarføra føroysku matvørurnar.

Vit mugu eisini fáa meira vitan um landbúnaðin inn í skúlarnar og eggja tað almenna til at nýta fleiri føroyskar matvørur t.d. í ellisheimum, skúlum o.s.fr. Soleiðis vekir tað kanska áhuga millum føroyingar at keypa meira føroyskt.

Kundi man lógarásett, at ein partur av tí, ið verður selt av grønmeti í Føroyum, skal vera føroyskt? Kundu føroyskir framleiðarar havt ein felags samleika ísv. við sølu? Ella samstarv ísv. við sølu av grønmeti ella samvinnufeløg?

Vit mugu eisini nýhugsa føroyska køkin matmentanarliga. Vit mugu menna siðbundnu matframleiðsluna.

Matmentanarliga skal eisini ein hugburðsbroyting til ísv. við grønmetisframleiðslu. Enn er tað matur av djórum, vit selja mest. Vit skulu eisini miða eftir fleiri keyparum av grønmeti.






## III. TRIÐI PARTUR

**Í triðja parti av verkstovuni varð hugt nærri at triðja tilmælinum:**

**Tilmæli:** ***Finna eitt hóskandi støði fyri matvøruframleiðslu og matvørutrygd og seta ítøkilig stevnumið. Lóggáva og peningaliga tileggjan og virkisætlanir eiga at stuðla undir stevnumiðum (við meginreglum um burðardygd).***

## Samanumtøka frá bólkaarbeiðinum

### *Karmar fyri vinnuligum landbúnaði*

Um vit vilja flyta føroyska landbúnaðin, so skulu vit eisini síggja landbúnaðin sum ein møguligan vinnuveg, sum man skal kunna liva av. Hetta krevur, at krøv verða sett til landbúnaðin. Neyðugt er at skapa rættar fíggjarligar karmar fyri landbúnaðin at framleiða. Neyðugt er, saman við viðkomandi aktørum, at hyggja neyvt at øllum stuðulsskipanum.

Vit eru noydd til at kunna framleiða eitt sindur av hvørjum, og ikki bert hugsa seyðin inn í framleiðsluna. Vit mugu fram ímóti einum sterkum matvørubúskapi.

Skal ein framleiðsluskylda áleggjast? Nevnt varð, at tú ikki kanst krevja, at nakar framleiðir við undirskoti. Um tað lønar seg, so hevði man kanska kunna gjørt tað.

Hvussu varðveita vit landbúnaðarjørð til framleiðslu? Her vóru ymiskar meiningar ísv. nýtsluskyldu. Hetta merkir eisini, at so má jørð takast frá einum øðrum.

### *Fólkið skal eisini kunna velta*

Vit skulu hava eina skipan, sum bæði kann rúma ta vinnuligu framleiðsluna, men fólkið skal eisini velta. Øll, ið eru áhugað, kunnu fáa møguleikan at fáast við at velta; seta eitt fræ niður og síggja tað vaksa og síðani eta sítt egna grønmeti. Tann vitanin kann eisini føra við sær, at vit fáa eina aðra matmentan í framtíðini, tí vit hava eitt ungt ættarlið, sum hevur royndir innan hetta. Atgongdin hjá okkum øllum at velta hevur týdning.

Hetta kundi verið eitt tilmæli til kommunur at tikið av almennum lendi til grønmetis-framleiðslu. Ella kundu bóndir leigað jarðarteigar út til framleiðslu?

### *Matpolitikkur*

Vit mugu hyggja nærri at matpolitikki í almennum kantinum osfr. sum stuðul hjá land-búnaðinum. Hvussu fær man landbúnaðarvørur inn í matpolitikkin?

**FYLGISKJAL**

## Burðardygt matsjálvbjargni í Føroyum

Tiltak á Búnaðarstovuni, leygardagin 15.apríl

**Skrá**

| | |
|---|---|
| Kl. 09.15 – 9.30 | Morgunkaffi |
| Kl. 09.30 – 09.45 | Maria G. Hansen (Umhvørvisstovan og Småsamfundsgruppen) bjóðar vælkomin |
| Kl. 09.45 – 10.05 | **Tilmælið**: *Kanna møguleikarnar at dyrka meira grønmeti, herundir at verja øki, ið eru egnað til at dyrka grønmeti, og brúka tøð, sum eru framleidd í Føroyum* // Jónhild Jacobsen (Uttastovugarðurin), Jens Ivan í Gerðinum (Búnaðarstovan) og Rakul Arnfríð Dam (Gróðurstøðin) |
| Kl. 10.05 – 10.35 | Bólkaprát við samanumtøku |
| Kl. 10.35 – 10.45 | Stuttur steðgur |
| Kl. 10.45 – 11.05 | **Tilmælið**: *Stuðla tættari samstarvi og samrøðu millum partarnar í allari virðisketuni í matvøruskipanini fyri at bøta um atgongdina til matvørur, sum eru framleiddar í Føroyum* // Eva í Dímun (Dímunargarður), Sunniva G. Mortensen (Matkovin) og umboð frá handli/heilsølu. |
| Kl. 11.05 – 11.25 | Bólkaprát við samanumtøku |
| Kl. 11.25 – 11.30 | Sera stuttur steðgur |
| Kl. 11.30 – 11.50 | **Tilmælið**: *Finna eitt hóskandi støði fyri matvøruframleiðslu og matvørutrygd og seta ítøkilig stevnumið. Lóggáva og peningalig tileggjan og virkisætlanir eiga at stuðla undir stevnumiðunum (við meginreglum um burðardygd) //* Joanna Djurhuus (Vinnumálaráðið), Sigert Patursson (Bóndafelagið) og Elisabeth S. Olsen (Setrið) |
| Kl. 11.50 – 12.30 | Kjak |
| Kl. 12.30 – Liðugt | Heitur miðmálið við kaffi og søtum omaná ( Kongsstovan í Haraldssundi ) |

Verkstovan varð lýst á heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni[1] og Umhvørvisstovuni og á Facebook.

Umhvørvisstovan og Sunniva Gudmundsdóttir Mortensen samskipaðu verkstovuna. Heidi Holm varð skrivari. Maria Gunnleivsdóttir Hansen, á Umhvørvisstovuni, hevur ritstjórnað samanumtøkuna.

Útgivið: 8. desembur 2023.

[1] https://www.bst.fo/Default.aspx?ID=13805&Action=1&NewsId=12127&M=NewsV2&PID=31403